# Vetrar kappingin byrjar

**Leygardagin 22. oktober byrjar TF vetrarkappingin hjá frælsa ítróttinum aftur**

RENNING
*tíðindaskriv*

Tað vóru Frælsur Ítróttur Føroya og Tryggingarfelagið Føroyar sum í fjør tóku stig til hesa kapping.
Kappast verður í fýra bólkum hjá kvinnum og monnum:

Veteranar kvinnur og menn (f. -1959) renna 10,5 km
Kvinnur og menn opin bólkur (f. -1989) renna 10,5 km
Kvinnuunglingar og mansunglingar (f. 1985-89) renna 10,5 km
Gentur og dreingir (f. 1990-1994) renna 5 km

Vaksin, veteranar og unglingar renna "Runt Agnið". Byrjað verður við Tofta Skúla, runnið verður síðan úteftir niðan á "Agnið". Málið er á Tofta kei.
Yngsti aldursbólkurin byrjar við Æðuvíksvegin og rennir inneftir móti Runavík og so út á Tofta Kei. Allir aldursbólkar byrja samstundis kl. 11.00.
Tryggingarfelagið Føroyar letur heiðursmerki og t-skjúrtu til nummar eitt, tvey og trý í øllum bólkum.

Annars vera hini umførini í TF vetrarkappingini eftir ætlan hesi:
19. nov. Klaksvík
7,85 km / 3,14 km
10. des. Tórshavn
12 km / 4 km
21. jan. Hvalvík
7,532 km / 2,511 km
25. feb. Í Vágunum
5 km / 3,1 km
25. mar. Runavík
10 km / 5 km

Meira fæst at vita um kappingina á heimasíðuni, athletics.fo
Tilmelding fer fram á her á síðuni innan fríggjakvøldið 21. oktober kl. 21.00.

Startnummur verða avheintaðið við Tofta Skúla leygardagin frá kl. 10.15. Tá verður luttøkugjaldið, ið er kr. 50,- fyri tríggjar teir elstu aldursbólkarnar og kr. 20,- fyri yngsta aldursbólkin, eisini goldið.

# Øssur er gipsaður

**Veteranurin á B68 liðnum verður ikki førur fyri at spæla, tá ið B68 leygardagin skal royna at tryggja sær uppflytingina**

B68
*Jóannes Hansen*



*Hóast skaðan, so spældi Øssur allar 90 minuttirnar, tá B68 vitjaði í Sandavági seinasta leygardag*

Ein av fáu veteranunum á unga B68 liðnum verður ikki á vøllinum, tá ið B68 leygardagin á heimavølli fer at stríðast fyri at tryggja sær fremsta plássið í 2. deild.
Øssur Hansen gongur við gipsaðum armi. Sambært heimasíðuni hjá Tofta Ítróttarfelag - b68.fo - so er høgri armur brákaður eitt sindur omanfyri skøvningin.
Tað var í tøttu og avgerandi uppgerðini í Sandavági leygardagin, at Øssur Hansen varð skaddur. Eftir stríð um luftbólt við mótstøðumann var Øssur óheppin, tá ið hann lendi. Armurin tók fyrst, og Øssur lá góða løtu á vøllinum, tí hann hevði fingið ilt. Øssur spældi tó víðari, og tað var ikki minst hansara avrik á miðvøllinum, sum var orsøk til, at tað stutt undan leikloki eydnaðist B68 at javna til 2-2 og harvið at vinna stigið, sum bar oddasessin við sær.
Eftir dystarlok í Sandavági fóru Øssur á Landssjúkrahúsið, og har vístu myndirnar skaðan, sum ber við sær, at Øssur Hansen ikki verður førur fyri at spæla leygardagin.
Í síðsta umfarinum skal B68 spæla móti GÍ, sum higartil í ár hevur fingið eitt stig. Uppgerðin verður á Svangaskarði klokkan 13.00. Setningurin hjá B68 er greiður. Hjá teimum ræður um at fáa øll stigini. Um tað fer at eydnast, so fer B68 at endurvinna plássið í bestu deildini, sum teir mistu fyri einum ári síðani.
Tá ið GÍ og B68 fyrr í summar spældu í Gøtu, vann B68 4-2. Men gøtumenn vóru ikki so lættir at boyggja, sum støðutalvan kundi bent á. GÍ var á odda bæði 1-0 og 2-1, áðrenn B68 síðsta korterið fekk málini, sum bóru sigurin við sær. Dystargongdina ta ferðina hava toftamenn neyvan gloymt, og tað er einki at ivast í, at venjarin, Julian S. Johnsson, og eitt nú Øssur Hansen fara at gera alt fyri at minna spælararnar á, at tað er alneyðugt at vísa rætta hugburðin og at stríðast fyri søkini.

# Føroyar javnaðu í síðstu løtu

**Tað eydnaðist ikki U 17 landsliðnum at vinna á San Marino, sum eitt skifti var frammanfyri við tveimum málum, og sum sigurin í evstu løtu glapp av hondum**

U 17 LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Í gjárkvøldið skuldi U 17 landsliðið lenda í Vágum, og harvið var altjóða virksemið hjá fótbóltslandsliðunum í ár lokið.
Í viðførinum frá EM undankappingini í Portugal høvdu U 17 dreingirnir tvey 4-0 tap - móti Týsklandi og Portugal - og 3-3 í síðsta dystinum, sum týsdagin var móti San Marino. Í samlaða roknskapinum endaði San Marino á aftasta plássinum, meðan Føroyar endaðu á triðja plássinum. Báðir partar fingu eitt stig, men Føroyar høvdu betra málmunin.
Tað var annars um reppið, at San Marino fingu øll stigini móti Føroyum. Teir løgdu seg á odda í 7. minutti. Henning Joensen úr VB javnaði í 16. minutti, og undan steðginum legði San Marino seg framum bæði 2-1 og 3-1.
Átta minuttir eftir steðgin minkaði Klæmint A. Olsen um munin til 3-2, og í 80. og síðsta minutti tryggjaði Klæmint A. Olsen Føroyum eitt stig, tá ið hann javnaði til 3-3.
Týskland vann undankappingarbólkin. Í síðsta umfarinum vunnu teir 2-0 á Portugal.

# Nýtt 5-mannafar til Havnina

Havnar Róðrarfelag hevur umbiðið nýtt 5-mannafar frá Sámali Hansen, soleiðis at betri umstøður verða til alvaróðurin
Hetta skrivar Havnar Róðrarfelag á heimsíðu sínari.
Sagt verður, at nú talan hevur verið um fleiri bátabólkar, er tað vorðið ein alsamt vaksandi trupulleiki at finna venjingartíðir til allar manningarnar, sum rógva við sama báti.
Men tann trupulleikin verður so munandi minni, tá felagið fær nýggjan bát.

-mørk

# Claus fekk tveir dagar

**Týskvøldið megnaði Coventry at røkka javnleiki, hóast teir eina løtu vóru aftanfyri við tveimum málum**

ONGLAND
*Jóannes Hansen*

Leygardagin varð føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen rikin av vøllinum, tí hann hevði nýtt neyðbremsuna. Mánadagin varð gjørt av, at reyða kortið skuldi kosta leikbann í tveir dagar.
Fyrri parturin av leikbanninum varð avgreiddur týskvøldið, og seinni parturin verður avgreiddur í vikuskiftinum. Týskvøldið vitjaði Coventry City í Ipswich.
Í fjør taldist Ipswich millum tey feløgini, sum kappaðust um at flyta upp. Tað miseydnaðist, og fyrsta partin av hesum kappingarárinum hevur tað ikki hilnast nakað serligt hjá Ipswich, ið er á tólvta plássinum - fimm stig frammanfyri Coventry.
Týskvøldið bendi alt fyrstu longu løtuna á, at Ipswich skuldi fáa fult, og at Coventry einki skuldi fáa. Ipswich var á odda 2-0, og í hálvleikinum var 2-1. Í 2. hálvleiki javnaði Coventry. Stigið bar við sær, at Coventry framvegis er dygst omanfyri niðurflytingar strikuna.
Í vikuskiftinum skal Coventry aftur - uttan Dlaus Bech Jørgensen - spæla á útivølli. Ta ferðina verður tað í Leicester.